# TUNNILIN MÁ

**MENNING** - Allir viðingar ynskja betri og tryggari farleið til bygdina. Viðareiðisvegurin er ikki ein haldbar loysn í dag, og tí síggja vit fram til at fáa ein tunnil, sigur 27 ára gamli Rói Absalonsen á Viðareiði. - Fólkið livir hvønn dag í ótta fyri, at okkurt álvarsamt skal henda. Vit ynskja eina tryggari farleið nú, áðrenn nakað hendir.



Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Viðareiði: Í nógv ár hevur verið tosað um ferðasambandið til bygdina her norðast á Viðoynni.

Hvønn dag koyra hundraðtals bilar eftir vegnum millum Viðareiði og Hvannasund. Og tað er nærum ikki dagur, at ikki grót og stórir steinar detta oman á vegin, har eisini bratt er niðurfyri.

Nógvir viðingar bera tí ótta fyri, at tann stóra vanlukkan skal henda onkrum. Tað kann vera ein bilur sum verður raktur, ella í ringasta føri ein bussur fullsettur av kátum skúlabørnum.

– Eg orki næstan ikki at hugsa handa tankan. Men tað hevði verið ein tragedia um tað hendi, sigur Rói Absalonsen, sum situr í Viðareiðis bygdarráði, men annars siglir sum dekkari við Norðborg.

Tað eru uttan iva fleiri, sum kundu hugsað sær at búsett seg í náttúruvøkru bygdini. Men tað eru helst mong teirra sum ikki hætta sær hetta, soleingi sum vegasambandið er so sum tað er í dag. Bygdin er tíbetur spard fyri stórar vanlukkur higartil, men spurningurin er bara hvussu leingi aftrat?

– Tað er eingin ivi: Vit mugu fáa ein tunnil til Viðareiðis, slær hann rimmarfast.

## Avlýstur

Rói Absalonsen var henda mikumorgunin í farnu viku farin úr heimbygdini á eitt skeið á brandskúlanum við Áir.

Hetta var ikki dagurin við tí besta veðrinum, tí bæði vindur og hvirlur gjørdu sítt til at firðir og sund stóðu í einum roki og trupult var at koyra henda túrin.

Sjálvur mátti Rói koyra eftir Viðareiðisvegnum, sum av mongum verður skýrdur sum ein deyðsfella. Men hetta forðar kortini ikki fólki í at fara av bygdini, annaðhvørt tað so er til arbeiðis, skúla ella øðrum ørindum.

– Ja, tá eg fór av húsum, áðrenn klokkan 7 í morgun, tá lá grót á vegnum. Og tá eg komu aftur fyri eini løtu síðani (um 2-tíðina, blaðm.), tá lá aftur grót á vegnum.

– So tú skilir, at hetta er altso ikki ein heilt vandaleys leið at koyra eftir, sigur Rói álvarsamur.

Á vegnum suðureftir møtti hann skúlabussinum, sum var á veg til Viðareiðis, í øðrum tunlinum.

– Men sum eg skilti kom hann ikki so langt, tí túrurin bleiv avlýstur av teirri orsøk, at tað var als ikki veður at koyra norður.

> Ein má ansa eftir, at ein ikki bara grenjar og fokuserar uppá tað negativa, tí tað kann vera so skjótt at ein forskrekkir fólk vekk

## Tunnilin kemur

Við seinasta kommunuval varð Rói valdur sum ein av fimm bygdarráðslimum á Viðareiði. Frammanundan hesum hevði hann eisini verið uppstillaður til løgtingsvalið fyri fólkaflokkin.

Í bygdarráðnum hava teir eisini havt hetta málið um vegasambandið til Viðareiðis frammi, og hava millum annað havt fundir við myndugleikarnar og við rættarnevndina hjá løgtinginum.

– Vit tosaðu við teir bæði um tunnilssambandið norður til okkum (tað er: millum Hvannasund og Viðareiði) og síðani víðari til Klaksvíkar (tað er: norður um Fjall).

– Og sum eg skilji tað nú, so er ein verklagslóg um ein tunnil til Viðareiðis á veg í løgtingið, sigur hann fegin á málinum.

## Ikki bara grenja

Nógv hevur verið tosað um farleiðina hjá viðingum, og hetta hevur Rói eisini fylgt væl við í, hóast hann er nógv burturi til skips.

Hann hevur kortini lagt merki til eitt, og tað er at nógv av tosinum hevur líkasum ein negativan tóna:

Altso at ein heftir seg við tað keðiliga alla tíðina; at vegurin er so og so vandamikil; at tunlarnir eru so og so ringar, og so framvegis og so framvegis.

– Ein má bara ansa eftir, at ein ikki bara grenjar og fokuserar uppá tað negativa, tí tað kann vera so skjótt at ein forskrekkir fólk vekk.

– Eg vóni sjálvandi ikki at nakar ikki skal tora at búseta seg her norðuri hjá okkum. Men vit mugu ikki bara hugsa negativt, sigur Rói. – Tí vit hava í roynd og veru so nógv gott at bjóða her norðuri.

## Framá

Tað sum bæði undrar Róa, tíðindatænastuna og mong onnur er, at hóast vegasambandið við umheimin er vánaligt og vandamikið, so veksur bygdin kortini.